# Kapping er sunn sum ein frísk appilsin

**Góð 300 virki hava skift til Kall, og tað sigur ikki so lítið. Kall hevur ment seg bæði á fastnet- og fartelefon-økinum, og í næstum verður eisini farið at bjóða fast ADSL-samband til internetið**



*Kall hevur sett lív í føroyska telefonmarknaðin.*

Tann lítli fiskurin noyðist altíð at flyta seg. Hann noyðist at vera kvikari, snildari og smidligari. Annars etur stóri fiskurin hann. Soleiðis er kapping. Eisini á teleøkinum. Kall noyðist alla tíð at røra seg, at kvika sær og vera vinarligari.

Kall setti beinanvegin tænastuna í miðdepilin, tá ið farið varð til verka. Tað er stuttur vegur millum kundan og Kall, og virkini hava sín persónliga virkisrøktara. Tí hava so nógv virki valt at skifta. Síðan politiski myndugleikin skipaði soleiðis fyri, at einkarætturin varð tikin av, eru góð 300 virki vorðin kundar hjá Kalli, og pláss er fyri fleiri.

Tað skerst ikki burtur, at síðan kapping kom í, eru útreiðslurnar sum heild minkaðar á telefonnýtslu. Men Kall bjóðar ikki bara lægri prís. Góðskan er dygdargóð, og tænastutilboðini eru mong, er greiði boðskapurin av Óðinshædd, har Kall hevur høvuðssæti.

Kall bjóðar sum er bæði ISDN og analogt samband til internetið. Næsta stigið verður at bjóða fast samband við ADSL-tøkni. Tað fer at økja ferðina og kapasitetin munandi, og trygdleikin verður munandi størri. Tøkniligi parturin av fyrireikingunum er í gongd, og helst verður fast internetsamband bjóðað kundunum einaferð seinni í ár. Nýggi FARICE-kaðalin gevur stórar møguleikar, sum Kall eisini fer at gera sær dælt av. Á KT-stevnuni fer Kall at vísa, hvørjar ætlanir og hvørji tilboð verða, tá ið ADSL eisini verður ein partur av útboðnum hjá Kalli.

Á KT2004 fer Kall eisini at sýna fram alt tað nýggjasta innan fartelefoni og víst verður, hvørjar tænastur Kall hevur at bjóða á økinum. Tað er ein sannroynd, at síðan Kall kom á marknaðin og fór at bjóða tænastur við fartelefonum, er prísurin nógv lækkaður og nógv fleiri tænastur eru í boði enn áður.

14 fólk starvast á Kalli, sum fór at bjóða tænastur í 2001. Tað hevur eydnast at fingið tann stóra kappingarneytan at fylgja aftaná, so hvørt nýggj tilboð eru bjóðað fram. Kall setti prísirnar niður, bjóðaði ókeypis internet og postkassar, og kappingarneytin fylgdi aftaná. Kall fór undir at bjóða Vinarkall, og seinni komu líknandi skipanir undan kavi.

Soleiðis er tað. Tann lítli fiskurin fær tann stóra fiskin at svimja skjótari. Tann lítli fiskurin finnur upp á ráð, og tann stóri fiskurin kemur í form. Vinnarin er kundin.

kall

Stovnað: 1999
Starvsfólk: 14
Stjóri: Bjarni Askham Bjarnason
Virksemi: Telefontænastur og internet

Okkara loysnir eru gjørdar at halda!




Grønlendska samfelagið er serstakt á mangan hátt. Hetta setur hørð krøv til KT-loysnirnar. Kimik iT hevur livað við hesum krøvum í mong ár og er í dag størsta KT-fyritøkan á grønlendska marknaðinum. Hørðu krøvini á heimamarknaðinum hava givið Kimik iT fyrimunir tá loysnirnar skulu nýtast í øðrum londum – eitt nú Canada og møguliga Føroyum.

KIMIK iT

*Vit eru at hitta á KT2004 framsýningini í Norðurlandahúsinum*



TÁ KORTIÐ GER MUNIN...

**Servitan í talgildari kortlegging.**
**Uppmáting, framleiðsla og útvegan av talgildum kortum.**
**Menning av forritum og ráðgeving.**
**GIS kort - geografisk kort við upplýsingum.**
**3D uppmátingar av bygningum, lendið v.m.**

MUNIN
SpF MUNIN • Dr. Jakobsensgøta 18 • FO-100 Tórshavn • Faroe Islands • tel +298 353600 • Fax +298 353601 • e-mail:munin@munin.fo • www.munin.fo



# HALDIÐ SOSIALIN



**400,-** um ársfjórðingin
- sparið **450,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað Sosialurin rindar postgjaldið
**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO